# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Ein merkiskvinna fyllir 75

Sunnudagin 19. juli fylti Jastrid Egholm Hansen, Sørvági, 75 ár.

Jastrid er fødd og uppvaksin í Vestmanna sum yngsta av 8 børnum hjá Gudrun og Jákupi Egholm. Tríggjar mánaðar áðrenn Jastrid bleiv fødd doyði pápin tá ið skip hansara, sluppin Neptun, gekk burtur. Sum 27 ára gomul flutti Jastrid í 1961 í nýbygd hús í Sørvági saman við manninum, Sigfred Hansen, og tvíburðasynunum Jákup og Jóhannus Egholm Hansen. Nakað seinni flutti eisini elsti sonurin Niels Egholm til Sørvágs. Seinni komu dótturin Jacoba og sonurin Sjúrður afturat. Maðurin, Sigfred Hansen doyði í 2004, 78 ára gamal.



Longu áðrenn Jastrid flutti til Sørvágs var hon millum teirra, sum setti spor eftir sær. Sum ung hondbóltskvinna var hon sostatt við á einum úrvalsliði, sum fór til Íslands at leika hondbólt.

Eisini eftir at hon flutti til Sørvágs hevur hon verið ein undangongukvinna, sum hevur verið við til at broyta bygdamyndina.

Í 1974 opnaðu hon og Sigfred eina kiosk Úti á Bakka (úti á kaiuni) í Sørvági, og í 1984 bygdu tey saman við tvíburðasynunum nýggja kaffistovu á sama stað.

Í 1981 bleiv Jastrid vald í nevndina í Sørvágs Húsmøðrafelag, og var frá fyrsta degi og næstu 24 árini fram til 2005 forkvinna í felagnum. Sum nevndarlimur og forkvinna arbeiddi hon í fleiri ár fyri at skapa undirtøku í bygdini fyri at opna vøggustovu og barnagarð til frama fyri útiarbeiðandi foreldrini. Á bygdarráðsfundi í 1993, hvar Jastrid var vorin vald inn, varð sett hart móti hørðum og gjørdi bygdarráði av at seta á stovn vøggustovu og barnagarð og at keypa gomlu sýslumanshúsini til endamáli.

Sum forkvinna í Sørvágs Húsmøðrafelag var tað eisini Jastrid, sum tók stig til at felagið ognaði sær egin hølir, tá ið felagið í 1995 keypti hølini hjá Føroya Banka í Sørvági. Keypi bleiv fíggja einans við teimum tiltøkum, sum Húsmøðrafelagið stóð fyri, eitt nú banko, jólaveitslur, matsøla á stevnum, o.s.fr.

Jastrid er ikki millum teirra, sum bara fannst at kommunalpolitikarum, hon var ósamd við, men sum eisini sjálv gjørdi nakað fyri at broyta støðuna. Á kommunuvalinum í 1989 bleiv Jastrid sostatt sum fyrsta kvinna nakrantíð vald í Sørvágs Bygdaráð fyri ein kvinnulista, hvar hon sæt í 4 ár. Hetta var slóðbrótandi, tí á teirri tíð vóru bert fáar kvinnur í føroyskum kommunalpolitikki.

Meðan Jastrid var nevndarforkvinna í Sørvágs Húsmøðrafelag tók hon eisini stig til at stovna dagtilhald fyri teimum eldru í Sørvági, og seinni eisini fyri teimum eldru úr hinum bygdunum í Vágum og hevur sjálv staði á odda fyri at røkja hesa uppgávuna fram til í ár.

Samstundis sum Jastrid hevur verði virkin úteftir hevur hon eisini tikið sær av uppvakstrinum av børnunum. Hóast hvørki Jastrid ella maðurin sjálvi hava nakra útbúgving, hava tey stuðla børnunum í at takað víðarigangandi útbúgvingar. Børnini eru sostatt í dag øll útbúgvin og í arbeiði í Føroyum, Danmark og Vietnam sum maskinmaður, advokatur/skipsførari, arkitektur, lækni og verkfrøðingur.

Jastrid helt føðingardagin heima saman við teimum av børnunum, sum eru stødd heima.

Tillukku við 75 ára degnum til eina merkiskvinnu.

**jh**

### Rætting

Í føðingardagsheilsan í vikuskiftisblaðnum skrivaðu vit, at Thordur Thorsteinsson fylti 50 ár leygardagin 18. mai. Tað er ikki rætt, hann fylti leygardagin 18. juli. Vit biðja orsaka mistakið.

*-red*

### Dagurin

**20. juli. Elias.** Dagurin verður hildin til minnis um profetin Elias, sum Kongabøkurnar í Gamla testamenti siga frá.
Í Føroyum hevur hann fingið navnið Líggjas. Bíbilskt navn, ið merkir Jahve er Guð mín.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Absalon Absalonsen 70 ár



Í dag 20. juli verður Absalon Absalonsen, ættaður úr Vági, búsitandi í Havn, 70 ár. Umframt so nógv annað, hevur Absalon fyrst og fremst verið sjómaður. Hann hevur verið á sjónum síni 50 ár, og teir eru ikki nógvir sum klára tað.

Pápi Absalon var Marius Absalonsen, ættaður av Viðareiði, sum eisini var ein royndur fiskimaður. Mamman var Frida f. Mikkelsen, ættað úr Vági.

Eina tíð undir krígnum búðu tey í Skálavík. Marius sigldi við Norðbúgvanum, har Esmar Fuglø var skipari. Men at búgva í Vági og sigla norðanfjørðs bar illa til sum ferðasambandið var til Suðuroyar tá. Tá lá tað nógv betri fyri at búgva í Skálavík, so gott ferðasambandið var í Sandoynna! Her kann verða nevnt, at Marius eisini var við Ananu mitt í 30-unum, har samlaða manningin var um 160. Hetta er fremsta átak á sjónum, sum hevur verið í Føroyum.

Absalon fór fyrst í realskúla í Vági, og so fór hann til skips. Hann fór fyrst sum messudrongur, síðan sum dekkari við trolaranum Fiskanes, sum tá var okkara flaggskip, nakað sum Norðborg í dag. Hesir fiskimenn fingu seg ofta royndar og hetta var ikki minst galdandi í januar 1959, tá ið Fiskanes var á somu leið sum Hans Hedtoft, og var Absalon eisini við tá. Manningin fekk fyri sín leiklut í leitingini av Hans Hedtoft viðurkenning frá KGH.

Men Fiskanes fekk eisini nógvan fisk, og tað var tiltikið, hvussu strævið tað var við hesum trolarum. Hetta var annars høvið til at lógfesta vaktarskipan umborð á trolarum, har teir skiftisvís arbeiddu og høvdu frí seks tímar.

Absalon hevur roynt nógv annað á sjónum. Hann sigldi sum skipari og búði í Grønlandi í fleiri ár. Hann letur væl at grønlendingum.

Hann var skipari á Jógvan á Gørðunum, einum av teimum stállínuskipum, sum vit fingu so nógvar av fram í 60-unum. Eitt skifti hevði hann eisini sluppina Sæborg, sum var keypt úr Lorvík.

Seinast í 60-unum varð Absalon skipari á Borgini. Teir royndu fyrst í Grønlandi, har teir eina ferð høvdu ein ringan túr heim. Teir fingu ein ringan sjógv, sum breyt alt omanav dekkinum. Telefonin fór eisini, og teir noyddust inn á Reykjavík.

Um hesa tíðina fóru menn at síggja møguleikar við ídnaðarfiski. Borgin var eitt av teimum fyrstu skipunum, sum fóru at royna hesa veiðu. Hetta vóru skip, sum vóru bygd til heilt aðra veiðu, men hesi skipini vístu, at hetta bar til.

Skjótt vóru skip bygd til endamálið, og vit fingu skjótt tíggjutals skip á ídnaðarveiðu. Hesin fiskiskapur kom at gerast sera týdningarmikil, tá ið vit komu inn í 70-ini. Her kom Absalon í felagsskap við Hera Hjelm, sum eisini hevði víðskygni á hesum øki. Teir keyptu Bjarnoy, sum var ein av teimum nógvu ídnaðarskipunum. Hesi tóku tó ikki so nógvan fisk í lastina. Tí kom hugskotið um størri skip, og hetta gjørdist gamli portugalstrolarin Vágbingur. Hetta førdi aftur til hugskotið at lata ídnaðarfiskin koma Suðuroynni til gagns, og fingu teir bygt fiskamjølsvirki í Lopra.

Men við ídnaðarfiski var tað kanska meira enn við fiskivinnu annars, at tað gongur upp og niður, og tá niðurgongdin kom varð lítið eftir av hesi vinnu. Bjarnoy 2/Vágbingur gjørdist annars sjónleikarhús í Stockholm!

Tá var rækjuveiðan meira í hæddini, og bygdu teir Svalbard, sum teir høvdu í nøkur ár, tá tað eisini her fór at ganga niður á bakka.

Absalon var kendur at vera sera góður at vera saman við sum skipari. Ein sumbingur segði einaferð við mammuna Fridu, at Absalon var besti skipari hann hevði verið saman við. Sinni var ikki skapt í honum.

Sjóvinnan hjá Absalon endaði so við, at hann eitt skifti var við South Island og síðan sigldi hann við hollendskum veitingarskipum til hann gavst fyri nøkrum árum síðani.

Absalon hevur eisini dámt at rógva út. Hann hevur róð út við Aksel (Thorsteinsson) hjá Jóin og hevur eisini verið formaður á útróðrarbátinum Albert Victor.

### Annað enn sjógvur

Absalon hevur havt annað á skránni enn sjógvin. Hann hevur skrivað ein hóp. Absalon hevur givið út væl umtóktu skaldsøgurnar Hjálpt úr Neyð og Sodnhúsfólkini, sum hava evni frá gomlum døgum í Føroyum. Her hevur Absalon verið so heppin at hava livað saman við ommuni og abbanum í Vági, sum vóru sera søgufróð, og sum hava givið íblástur til hesar skaldsøgur, sum tískil eisini eru grundaðar á veruligar hendingar.

Síðan gav hann út ævisøguna hjá kenda skiparanum Jóan Petur hjá Mouritsi. Henda bók er eitt virðismikið íkast til okkara fiskimannasøgu. Bókin er sera umfatandi og í henni eru nevnd ikki færri enn 155 skip og 735 persónar.

Tí er tað ofta, tá sóknast verður eftir onkrum upplýsingum um skip og menn, at teir finnast í hesi bók.

Tað seinasta skrivliga avrikið er týðingini av bókini um Titanic "Ein minnilig nátt," sum upprunaliga kom í 1956. Nú filmar verða gjørdir, har nógv ípsinn er í søguni, kann tað vera gott at fáa eina bók um hesa hending, sum heldur seg til verunleikan.

Absalon dugur eisini at yrkja, og okkurt yrkingasvn er komið út.

Hann hevur áhuga fyri samfelagsviðurskiftum og var nógv ár løgtingsvalevni í Suðuroynni hjá Sjálvstýrisflokkinum

Seinastu tíðina er Absalon eisini kendur sum vertur á Torginum í Rás 2, har hann hevur sýnt gott hegni at fáa gestir at greiða frá teirra lívi bæði á tí tímiliga og andaliga økinum.

Eins og foreldrini hevur Absalon alla sína tíð verið virkin í Brøðrasamkomuni í Vági, í Nuuk og nú í Havn.

Absalon er giftur við Elsu f. Weihe av Selatrað. Hon er dóttir Andreu og Lassen Weihe. Børnini eru Árni, Laila, Bjarni og Ragnar. Systkini eru Óluva, John, Hanna, Anna Gretha og Ólavur.

Føðingardagurin verður hildin í Danmark. Hiðani verður ynskt hjartaliga tillukku.

**ó.**